## Zlatan bjargaði Svøríki

Eitt ótrúligt mál hjá Zlatan Ibrahimovic í yvirtíðini gjørdi, at Svøríki slapp úr Budapest í Ungarn við øllum trimum stigunum í HM-undankappingarbólki 1. Svøríki fekk eina dreymabyrjan. Tá longu átta minuttir vóru farnir legði Olof Mellberg Svøríki á odda 1-0. Hendan støðan helt sær líka til 79 minuttir vóru farnir. Tá fekk Ungarn brotsspark, sum Huszti setti í netið. Tá sá svart út hjá Svøríki. Men í yvirtíðini lýsti stóra stjørnan, Zlatan. Ein verjuvilla gjørdi, at Zlatan kom at standa einsamallur við ungarska málverjanum. Zlatan fekk eina langa tá á bóltin. Málverjan bjargaði í fyrstu atløgu, men bólturin støkk út aftur til Zlatan, sum sparkaði bóltin í tað tóma ungarska málið. Fagnaðurin á svenska spælarunum mundi ongan enda fingið, meðan teir ungarsku spælarnir tveittu seg niður á vøllin, vónbrotnir og knústir um, at teir høvdu mist eina stigið úr hondunum.

## Frakland spilti møguleikan

Frakland hevði ein gyltan møguleika at hála inn á Serbia leygardagin, og at leggja sjógv ímillum seg, Eysturríki, Litava og Rumenia. Men henda møguleikan spiltu fraklendingar við einum sjálvmáli. Tá 49 minuttir vóru farnir legði Thierry Henry Frakland á odda 1-0. Talan var um landsliðsmál nummar 49 hjá Thierry Henry. Fraklendingar og viðhaldsfólkini á tí útselda Stade de France høvdu ikki meir enn fingið armarnar niður, so stóð á jøvnum 1-1. Tá 56 minuttir vóru farnir beindi Julien Escude bóltin í egið mál til javnleik 1-1. Fraklendingar hava ein sera torføran útidyst í Beograd mikukvøldið. Serbia hevur 18 stig, fýra stig meir enn Frakland, sum hevur 14 stig, og hevur heimaliðið tí eitt framúrskarandi útgangsstøðið. Rumenia tekur ímóti Eysturríki, meðan Føroyar taka ímóti Litava.

# Fekk sítt fyrsta mál

Sjey minuttir fyri tíð eydnaðist føroyska landsliðnum at pynta um úrslitið, tá Bogi Løkin vann bóltin á miðvøllinum, rak eitt lítið sindur og síðani sendi eina góða sending fram til Andreas Lava Olsen. Hann setti ferð á, rann mótstøðumannin av og fekk úr spískum sent bóltin millum beinini á eysturríkska málverjanum.

– Sendingin hjá Boga gav mær ein frírennara, og eg fekk so prikað bóltin millum beinini á málverjanum. Eg kundi kanska havt skotið við síðuna av honum, men tað er ikki altíð, at tú fært tað, sum tú vilt hava tað. Men tað var mál, og tað var tað, ið taldi mest, segði skjóti spælarin hjá Víkingi eftir dystin.

– Tað var ein góð kensla at síggja handa bóltin fara inn, tí hetta var fyrsta málið hjá mær í altjóða dysti yvirhøvur. Sjálvt um tað pyntaði um, so kundu vit slett ikki vera nøgdir við at tapa 3-1, tí vit høvdu ætlað okkum eitt betri úrslit. Men vit koma sterkt aftur til næsta dyst.

*-hil*



**Við skjótleika sínum vísti Andreas Lava Olsen, at hann væl er førur fyri at standa seg á altjóða pallinum**

## Verjan lá ov langt afturi

– Vit vóru øgiliga skuffaðir av okkum sjálvum í fyrra hálvleiki, tá vit gjørdu tað so torført fyri okkum sjálvar. Men vit fingu justerað eitt sindur, so vit fingu verjuna eitt sindur longur fram, tí hon fall eitt sindur aftur í fyrra hálvleiki, segði annar hjálparvenjarin, Jens Martin Knudsen, sum leygarkvøldið fyri fjórðu ferð møtti Eysturríki.

– Tað skal eitt lítið sindur av vilja til, at halda æruni upp á pláss, sum tað bleiv allíkavæl. Og vit kundu so fegnast um, at Andreas Lava Olsen kom inn og fekk eitt mál. Taka vit seinna hálvleik, so eru vit nokk so positivir til næsta dyst.

Hann fortaldi, at í hálvleikinum hevði Brian Kerr sagt við spælararnar, at um hann kundi gjørt tað, hevði hann skift allar út.

– Einki er at ivast í, at høvdu vit havt sama innsats í seinna hálvleiki, høvdu vit blivið fullkomuliga úrlatnir. Men vit hava sæð tað fyrr, at menn klára at samla seg, og tað sóu vit aftur hesa ferð, segði Jens Martin.

– Tað er hetta, sum er spennandi við liðítrótti, at tú veitst ikki ordiliga fyrr enn aftaná, hvussu menn megna uppgávuna. Tó undraði tað okkum stórliga, at tað gekk so illa í fyrra hálvleiki, og menn skulu veruliga vísa nakað annað á Svangaskarði mikudagin, tá vit taka ímóti Litava.

*-hil*

# Var væl fyrireikaður

**Eysturríkski landsliðsvenjarin, Dietmar Constantini, var í Føroyum og hugdi at Serbia-dystinum, og tað var hann fegin um leygarkvøldið. – Tað gjørdi, at eg var væl fyrireikaður undan hesum dystinum, segði hann eftir eysturríkska 3-1 sigurin í Graz**




Hilmar Jan Hansen

– Vit taptu jú ímóti Føroyum á sinni, so øll vita, hvat kann henda. Men eg vildi ikki verða næsti landsliðsvenjarin hjá Eysturríki, sum kom í ta støðuna, so tí eg eri fegin um, at eg valdi at hyggja at Føroyum áðrenn, segði venjarin hjá Eysturríki, Dietmar Constantini, tá Sosialurin hitti hann eftir dystin í Graz leygarkvøldið.

– Føroyar spæla sera góðan kontrafótbólt, men tað høvdu vit fyrireikað okkum uppá, og tað gjørdi, at vit kundu vinna í dag. Eg hevði stóra virðing fyri føroyska liðnum, og tí haldi eg, at tað eisini eydnaðist at leggja eina ætlan fyri dystin, ið helt allan vegin.

Constantini, ið hevur verið líka leingi landsliðsvenjari hjá Eysturríki, sum Brian Kerr hevur verið tað hjá Føroyum, fegnaðist um sigurin og ásannaði, at skjóta málið gjørdi munin.

– Tað hjálpti okkum sera væl, at vit fingu eina sera góða byrjan, men síðani tóku vit okkum helst í so nógv av løttum. Í einum slíkum dysti áttu vit vanliga havt fingið eini tvey mál aftrat, men nú dysturin er av, eri eg nøgdir við at vinna 3-1, segði eysturríkski landsliðsvenjarin.



**Eysturríkski landsliðsvenjarin, Dietmar Constantini, fegnaðist leygarkvøldið um góðu eysturríksku byrjanina og at Føroyar ikki fingu sítt mál fyrr enn so seint í dystinum**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### Gott seint mál

– Øll væntaðu, at vit skuldu vinna dystin, men eg var sannførdur um, at tað neyvan fór at verða so lætt. Tit fingu eitt sera gott mál ímóti okkum, og vit kundu bara fegnast um, at tit fingu tað so seint í dystinum, segði hann.

Nú øll liðini í HM-undankappingarbólki 7 hava spælt sjey dystir, er Eysturríki á triðja plássi, fýra stig aftan fyri Frakland og heili átta stig aftan fyri Serbia.

– Eg taki ein dyst í senn, men eg eri eingin droymari. Vit eru í bólki saman við Serbia, Fraklandi og Rumenia, sum øll eru betri enn vit, og framvegis hava vit dystir eftir ímóti Rumenia, Litava og Fraklandi, so vit fáa at síggja, segði fryntligi og fyrikomandi venjarin.

Dietmar Constantini vildi annars fegin sleppa at senda føroyingum eina heilsan og takka fyri blíðskapin, tá hann var í Føroyum.

– Øll vóru sera blíð og fyrikomandi, og tað vil eg fegin takka tykkum fyri, segði hann.